# ítróttur

Nr. 195 • mikudagur • 12. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


## Holte taptu aftur

Bárður B. Mikkelsen og Ragnar í Haraldsstovu taptu aftur hetta vikuskiftið í donsku flogbóltskappingini. Hesaferð var mótstøðan úr SK Århus. Hetta liðið gjørdist silvurvinnarar í fjør, og eisini í ár verður mett, at teir fara at blanda seg í oddin.

Endaliga úrslitið av dystinum gjørdist 3-1 til SK Århus, men allan dystin var Holte kortini væl við.

Komandi vikuskifti fær Holte vitjan av DHG Odense, sum í fjør vann danska meistaraheitið, og tað verður í øllum førum ikki nøkur løtt uppgáva.

**-jm**

# Daewoo Open á Kambsdali

Ítróttarhøllin á Kambsdali var karmur um eina stóra badminton kapping, við umleið 100 luttakarum um vikuskiftið. Eisini var vitjan til kappingina komin úr Danmark. Luttakarnir vóru ímillum 6 og 18 ár.Kappast var allan leygardagin, 14 tímar íalt og sunnudagin í 5 tímar. Leiktir vóru omanfyri 500 dystir.

Gentur U9
1 Rannvá Carlson HBF
2 Lilja Luid HBF
3 Vár Næs ÍF

Dreingir U9
1 Pól Magnus Petersen ÍF
2 Julian Olsen VÍF
3 Sámal Joensen ÍF

Gentur U11
1 Birita Poulsen VÍF
2 Randi Virgarsdóttir VÍF
3 Súsanna Poulsen VÍF

Dreingir 11
1 Ari Ellingsgaard ÍF
2 Leivur Joensen ÍF
3 Rúni Hentze ÍF

Gentur U13
1 Brynhild Carlsen HBF
2 Hanna Elisa Arge HBF
3 Sigrid Dalsgaard HBF

Dreingir U13
1 Reidar Luid HBF
2 Fríði Lamhauge HBF
3 Rasmus Mogensen DK

Gentur U15
1 Guðrun Lervig ÍF
2 Óluva Bærentsen ÍF
3 Ranvá Lava Olsen ÍF

Dreingir U15
1 Flóvin Mikkelsen HBF
2 Filip Gram MBF
3 Sigurd D. Carlsson HBF

Gentur U18
1 Maibritt DK
2 Lis Hansen VÍF
3 Sarita Hansen VÍF

Dreingir U18
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Rógvi Poulsen HBF
3 Hilmar K. Jacobsen HBF



*Hjá yngstu gentunum gjørdist Rannvá Carlson úr HBF vinnari frammanfyri Liljuna Luid og Vár Næs úr ávíkavist HBF og ÍF*

# 3. umfar av Daewoo kappingini

**Triðja umfarið í Daewoo Marathon Cup verður 18. oktober**

RENNING
*tíðindaskriv*

Leygardagin 18. oktober skipar Ítróttafelagið Roysnið fyri 3. umfari av Daewoo Marathon Cup 2003 á Toftum. Í fjør luttóku 50 rennarar í hesi kappingini.

### Tey vaksnu renna Runt Agn

Kappast verður á ymsum teinum hjá børnum og vaksnum. Kappingin hjá teimum vaksnu verður runnin Runt Agnið. Hesin teinurin er 10,5 km til longdar. Byrjað verður við Tofta skúla, og málið er niðri á keiøkinum.

### Børnini renna á Svangaskarði

Sum nakað nýtt fara børnini í ár at renna á rennibreytini á Svangaskarði. Kappast verður á hesum teinum:
-Dreingir-7/Gentur-7 (f.1996 ella seinni) renna 600 m.
-Dreingir-10/Gentur-10 (f.1993-1995) renna 600 m.
-Dreingir-13/Gentur-13 (f.1990-1992) renna 1.609 m (1 míl).
-Dreingir-17/Gentur-17 (f.1986-1989) renna 1.609 m (1 míl).

### Skrá

-Kl. 12.30 Avheintan av startnr. á Svangaskarði
-Kl. 13.15 10,5 km vaksin (f. -1985)
-Kl. 13.30 Børn 7 ár (f.1996-)
-Kl. 13.40 Børn 10 ár (f.1993-1995)
-Kl. 13.50 Børn 13 ár (f.1990-1992)
-Kl. 14.00 Børn 17 ár (f.1986-1989)

- Eftir verða heiðursmerkini handaði á Svangaskarði.

### Støðan hjá teimum vaksnu

Støðan eftir tvey umfør er tann, at hjá monnunum er Guttorm Sørensen fremstur, meðan Jonhard Larsen úr Treystinum er nummar tvey, og Sigurð Justinussen úr Bragdinum er nummar trý. Íalt 16 menn eru framvegis við í samlaðu kappingini, meðan ongin kvinna hevur luttikið í báðum umførunum.

Hjá veteranunum er Ólavur H. Olsen fremstur, meðan Henning C. Poulsen og Holger Arnbjerg eru ávikavist nummar tvey og trý. Teir eru allir úr Bragdinum.

### Kappingin hjá børnunum

Kappingin hjá børnum er eins og hjá teimum vaksnu samansett av fýra rennikappingum, men hesar eru tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon) til longdar hjá børnum -13 og -17 og 2.109 metrar (ella 1/20 marathon) til longdar hjá børnum -7 og -10.

Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin.

Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerki til nr. 1, 2 og 3. Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3 samanlagt, tvs. At bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup.

Fyrireikararnir úr Roysninum leggja dent á, at rennikappingin leygardagin er fyri øll, og teir vóna, at luttøkan verður góð.



## LÍF helt sessinum

Leirvíkingar vunnu 3-1 í seinna upp- og niðurflytingardystinum móti EB/-Streymi um vikuskiftið. Eftir 1-1 javnleik á Mølini fyri viku síðani varð annars roknað við, at LÍF væl kundi fáa trupulleikar við at halda sessinum í næstbestu deildini, tí í løtum hevði heimaliðið tá eitt sera gott trýst á LÍF, men tann støðan var í øllum førum koppað á leygardagin.

Við málum frá Petur Sjúrðarberg, Bárður Heinason og Magnus Dalbø løgdu leirvíkingar seg framum 3-0, og so munaði tað lítið, at Búgvi Øster fekk minkað um munin seinni í dystinum. Samanlagt var LÍF vinnarin, og soleiðis kunnu teir enn einaferð brynja seg til eitt ár millum teir næstbestu. Hjá EB/Streymi var tapið kanska ikki nøkur vanlukka, men hinvegin vildi tað verið hugagott hjá felagnum, um dystarvenjingin hjá teimum næstbestu er á so høgum støði sum gjørligt.

**-jm**

## Ónøgdir Fram'arar vunnu

Teir í Fram vóru í øðini inn á kappingarnevndina, tá tað ikki eydnaðist liðnum at vinna sær beinleiðis uppflyting í finaludystinum í fjórðu deild. Eitt var, at SÍ var eitt trupult mótstøðulið, men tað var nú ikki tað, sum tey í Fram høvdu nakað ímóti. Trupulleikin var, at dysturin skuldi spælast í Miðvági, og hartil við einum dómara, sum hevði tilknýti til Sørvág, men hóast mótmæli, so lat kappingarnevndin ikki við seg koma. Ein støða, sum formaðurin í Fram helt í besta føri vísti eina líkasælu við fótbóltin í fjórðu deild, har menn eisini leggja nógv fyri.

Men tað eydnaðist so kortini hjá Fram, tá alt kom til alt. Í upp- og niðurflytingardystinum gekk leiðin aftur til Miðvág, og hesaferð vunnu teir 3-1 móti vágamonnum, so trumfirnir vóru allir í Havn undan seinasta dystinum. Og heldur ikki her lat Fram nakran iva vera um úrslitið. Fyrra hálvleik hendi tó ikki tað heilt stóra, hvat málum viðvíkur, men tá Kári Reynheim, sum nú er leikandi venjari hjá Fram, legði heimaliðið á odda, mundu gestirnir síggja skriftina á vegginum. Seinni bendi Sunnleif Midjord allan iva til viks, og tryggjaði harvið, at Fram komandi ár aftur er í triðju deild.

**-jm**


Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr. í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn